**Sørvágs Kommuna**
FR-380 Sørvágur . Tlf. +298 32004/33122 . Fax +298 32952

29.12.97

# Kunningarskriv 1997



*Sum* vanligt undir seinasta bygdarráðsskeiði fara vit eisini hesa setuna at senda út eitt kunningarskriv við ársenda og greiða okkara borgarum eitt sindur frá bygdarráðsarbeiðinum í farna ári.

*Bygdarráðið* hevur seinasta árið havt nítjan bygdarráðsfundir og viðgjørt gott hundrað mál av ymiskum slagi: byggiloyvir - stuðlar - skattamál - mentunnarmál o. a.

*Ásannandi* at byggisamtykt og býarskipanin fyri Sørvágs kommunu fóru úr gildi 01. januar 1997, hevur bygdarráðið samtykt - við smávegis broytingum á havnaøkinum - at leingja hesar at galda fram til 01. januar 2000.

*Á havnalagnum* er seinasta ár asfalterað fyri kr. 227.000, og meðan vit eru úti á bakka, kunnu vit siga, at ætlandi koma estlendsk skip fyrst í komandi ári higar til umvælingar.

*Seinasta* ár var greitt frá, at Sørvágs kommuna hevði sagt upp leigusáttmálan við p/f Føroya Fiskavirking, sum so skuldi havt við sær, at málið skuldi leggjast fyri ein gerðarrætt til endaliga støðutakan, men vegna tey "turbulentu" viðurskiftini innan fiskiídnaðin í Føroyum tá, avgjørdi bygdarráðið at útseta avgreiðsluna av leigusáttmálanum, til greiða var fingin á, hvat fór at henda við p/f Føroya Fiskavirking. Hesin spurningur er so avgreiddur í farna árinum - á tann hátt - at Fiskavirking hevur selt ognir sínar í Sørvági. P/f Vesturvón, íð frammanundan eigur hvíta virkisbygningin uttast á havnarlagnum, hevur keypt "bláa flakavirkið", og Sp/f Raspan - teir somu sum eisini eiga Sp/f Sørvágs Laks - hava keypt "gamla flakavirkið".

*Fíggjarætlanin* fyri 1998. Á bygdarráðsfundi 27.11.97 var fíggjarætlanin hjá Sørvágs kommunu til 3. viðgerð og endaliga samtykt. Skattaprosentið verður óbroytt 21%, kirkjuskatturin 0,25% og barnafrádrátturin verður 2500 kr. Eisini var samtykt at gjalda tvær milliónir í eykaavdráttum í 98.

*Viðvíkjandi* veðhaldsgrunninum hava kommunurnar frá Føroya Landsstýri fingið skriv um, at inngjaldið í grunnin pr. 31.12.97 verður mett til 133 mió. kr. og lán til kommunur til 23,5 mió. kr., soleiðis at grunnurin kemur at hava umleið 109,5 mió. kr. í tøkum peningi. Avgjørt er tí, at kommunurnar ikki rinda nakað gjald til grunnin í 1998. Hetta merkir tó ikki, at skattaprosentið kann lækkast ella rakstur og íløgur hækkast, men at upphæddin, svarandi til inngjaldið, verður avsett til eykaavdráttir av skuldini hjá kommununi.

*Sørvágs kommuna* hevur inngoldið 2,6 mió. kr. í kreppulánsgrunnin.

*Grannskoðaði* roknskapurin fyri 1996 hjá Sørvágs kommunu var framlagdur og góðkendur á bygdarráðsfundi 09.12.97. Ársroknskapurin vísir ein rakstur sum javnvigar við kr17.512.952, og eini fíggjarstøðu sum javnvigar við kr. 34.570.426. Í fíggjarætlanini fyri 1996 varð roknað við einum avlopi áðrenn avdráttir uppá kr. 1.131.000. Roknskapurin vísir eitt avlop uppá kr. 4.952.000. Avdráttir og rentur vóru samanlagt kr. 3.362.667

*Fíggjarætlanin* fyri 1998 hjá Felagskommununi er kr. 388.664 harav 138.664 kr. verða nýttar av likviditetinum hjá Felagskommununi. Restin, kr. 250.000, verða býttar soleiðis, at helvtin verður deilt í mun til skattskyldigu inntøkuna fyri árið 1996, meðan hin helvtin verður býtt í mun til fólkatalið í kommununum 01.01.1997. Samlaða býtið fyri 1998 verður: Miðvágs kommuna kr. 89.337,50 - Sørvágs kommuna kr. 90. 200,00 - Sandavágs kommuna kr. 63.425,00 - Bíggjar kommuna kr. 5.562,50 - Mykines kommuna kr. 1.475,00.

*Viðvíkjandi* oljuráðgevanum skal sigast, at Suður - Vestur Samtakið hevur longt samstarvssáttmálan við Suna á Dalbø í eitt tveyára skeið aftrat.

*Í seinasta* kunningarskrivi søgdu vit frá, at kloakkin frá flogvøllinum út í Bugin úti á Stongum væntandi kundi takast í brúk í komandi ári, og hetta gjørdist veruleiki hósdagin 17. desember, tá Landsverkfrøðingurin avhendi kloakkarbeiðið og trýst var á knøttin, sum fær alla spillvatnssevju av Vatnsoyrum at renna "niðan" til Sørvágs.

*Skipanin* er soleiðis uppbygd, at alt verður savnað í ein tanga við innkoyringina til Vatnsoyrar. Í hesum tanga eru tvær pumpur, sum pumpa ávegis niðan til krossvegin norð á Mýrar, har næsti

pumpibrunnur, við tveimum pumpum, ger restina av arbeiðinum niðan um hægsta punkt. Síðani rennur oman í ein pumpubrunn niðri í Oyruni, sum trýstir kloakkvatnið út á sjógv.

*Í samband* við kloakkarbeiðið hevur Sørvágs kommuna fingið Landsverkfrøðingin at lagt ein 10 tumma vatnleiðing frá krossvegnum oman á flúgvarabedingina og niðan á slætt. Eisini hevur kommunan lagt eina fýratumma kloakkleiðing úr sama krossvegi og oman í pumpubrunnin í Vatnsoyrum. Hetta seinasta er gjørt við framtíðar ferðavinnu á økinum við flúgarabedingina í huga.

*Lyktasteyrarnir* frá Haraldstrøð oman í Bíggjarvegin eru tiknir niður, og nýggjar stálmastrar settar upp og linjan løgd í jørð. Komandi ár er ætlanin at halda fram við hesum arbeiði, og verður tá farið út eftir ovari vegi, har kommunan so fer at leggja vatn og kloakk í somu grøv.

---

*Fólkatalið* í Sørvági 23.12.1997.

| ÁR | TAL |
|---|---|
| 0 | 9 |
| 1 | 11 |
| 2 | 12 |
| 3 | 10 |
| 4 | 11 |
| 5 | 12 |
| 6 | 11 |
| 7 | 21 |
| 8 | 22 |
| 9 | 13 |
| 10 | 11 |
| 11 | 16 |
| 12 | 11 |
| 13 | 15 |
| 14 | 10 |
| 15 | 7 |
| 16 | 16 |
| 17 | 10 |
| 18 | 16 |
| 19 | 12 |
| 20 | 8 |
| 21 | 10 |
| 22 | 11 |
| 23 | 6 |
| 24 | 10 |
| 25 | 11 |
| 26 | 7 |
| 27 | 8 |
| 28 | 12 |
| 29 | 8 |
| 30 | 9 |
| 31 | 18 |
| 32 | 8 |
| 33 | 11 |
| 34 | 16 |
| 35 | 14 |
| 36 | 8 |
| 37 | 17 |
| 38 | 12 |
| 39 | 9 |
| 40 | 10 |
| 41 | 9 |
| 42 | 9 |
| 43 | 9 |
| 44 | 10 |
| 45 | 10 |
| 46 | 11 |
| 47 | 16 |
| 48 | 19 |
| 49 | 14 |
| 50 | 12 |
| 51 | 11 |
| 52 | 10 |
| 53 | 14 |
| 54 | 17 |
| 55 | 10 |
| 56 | 11 |
| 57 | 12 |
| 58 | 11 |
| 59 | 7 |
| 60 | 13 |
| 61 | 4 |
| 62 | 7 |
| 63 | 5 |
| 64 | 2 |
| 65 | 2 |
| 66 | 5 |
| 67 | 9 |
| 68 | 9 |
| 69 | 9 |
| 70 | 11 |
| 71 | 14 |
| 72 | 7 |
| 73 | 6 |
| 74 | 6 |
| 75 | 9 |
| 76 | 6 |
| 77 | 14 |
| 78 | 7 |
| 79 | 6 |
| 80 | 8 |
| 81 | 5 |
| 82 | 4 |
| 83 | 4 |
| 84 | 2 |
| 85 | 2 |
| 86 | 1 |
| 87 | 1 |
| 89 | 3 |
| 90 | 2 |
| 95 | 1 |
| 101 | 1 |
| | 886 |

*Regluligu* bygdarráðsfundirnir í árinum 1998 eru fastlagdir til hesar dagar:
Mánadagin 26.01.98 - Mikudagin 25.02.98 - Hósdagin 19.03.98 - Týsdagin 21.04.98 - Mánadagin 25.05.98 - Týsdagin 16.06.98 - Mikudagin 02.09.98 - Hósdagin 08.10.98 - Mikudagin 11.11.98 - Hósdagin 10.12.98

*Hetta* var so ein roynd at kunna okkara bygdarfólk eitt sindur um farna árið, og tað verður so upp til hvønn einstakan, hvussu hetta skal sodnast. Er tað nakar, íð saknar ella ynskir meira vitan av almennum áhuga, ber til at venda sær til skrivstovuna.

*Til seinast* ynskja vit øllum bygdarfólkunum eitt eydnuberandi nýggjár við vónini um bjarta framtíðarvón fyri okkum øll.

SØRVÁGS KOMMUNA

Petur Kruse, form.



# Sørvágs Kommuna * Fíggjarætlan 1998 * 27.11

| 1995 | | 1996 | 1997 | 1998 |
|---|---|---|---|---|
| 73.000.000 | Skattskydug inntøka: | 71.500.000 | 84.054.000 | 89.816.255 |
| 23% | Skattaprosent: | 21% | 21,3% | 21,3% |
| 2.500 | Barnafrádráttur: | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| 0.05% | Kirkjuskattur: | 0,25 | 0,25 | 0,25 |

| Roknskap.: 1995 | | Roknskap.: 1996 | Meting 1997 | Fíggjarætlan: 1998 |
|---|---|---|---|---|
| | **RAKSTUR:** | | | |
| 47.544 | 1000. Byggibúning | 18.004 | -14.745 | 85.000 |
| 139.623 | 2000. Kommunal virkir | 55.882 | 181.085 | 49.800 |
| 1.707.773 | 3000. Teknisk mál | 1.784.025 | 2.368.676 | 1.876.000 |
| 2.084.384 | 4000. Skúla- og mentunarmál | 1.929.382 | 2.024.645 | 2.111.000 |
| 2.059.030 | 5000. Almanna- og heilsumál | 2.362.473 | 2.373.685 | 2.452.920 |
| 1.102.580 | 6000. Kommunala fyrisitingin | 1.230.045 | 1.209.683 | 1.076.875 |
| **7.140.934** | **A. RAKSTUR SAMANLAGT** | **7.379.811** | **8.143.029** | **7.651.595** |
| | | | | |
| | **ÍLØGUR:** | | | |
| 21.885 | 1000. Byggibúning | 16.618 | 87.200 | 319.000 |
| 72.726 | 2000. Kommunal virkir | 182.019 | 546.128 | 503.000 |
| 320.423 | 3000. Teknisk mál | 316.924 | 152.059 | 1.333.000 |
| 57.793 | 4000. Skúla- og mentunarmál | 95.498 | 316.110 | 164.000 |
| 0 | 5000. Almanna- og heilsumál | 0 | 0 | 0 |
| 42.344 | 6000. Kommunala fyrisitingin | 52.518 | 25.000 | 20.000 |
| **515.171** | **B. ÍLØGUR SAMANLAGT** | **663.576** | **1.126.497** | **2.339.000** |
| **7.656.105** | **RAKSTUR & ÍLØGUR** | **8.043.387** | **9.269.525** | **9.990.595** |
| | 62500. REGULERINGSKONTO R/Í | | | 399.317 |
| | | | | 10.389.912 |
| **3.390.334** | **C. RENTUR** | **1.932.303** | **1.773.522** | **1.522.787** |
| | | | | |
| | **FÍGGJARBROYTINGAR:** | | | |
| 1.753.522 | Goldin veðhald | 0 | 0 | 0 |
| 649.931 | Goldi í kreppulánsgrunn | 705.570 | 700.000 | 0 |
| 997.587 | Øking av likvidum | 2.032.481 | 1.159.021 | 19.251 |
| 564.442 | Aðrar fíggjarbroytingar | 1.008.368 | 987.095 | 624.202 |
| **3.965.482** | **D. FÍGGJARBROYTINGAR** | **3.746.420** | **2.846.116** | **643.453** |
| | | | | |
| 713.976 | Avdráttur | 1.242.408 | 1.167.430 | 1.062.419 |
| 0 | Eykaavdráttur | 0 | 0 | 2.000.000 |
| **713.976** | **E. AVDRÁTTUR AV LÁNUM:** | **1.242.408** | **1.167.430** | **3.062.419** |
| | | | | |
| **15.725.897** | **ÚTREIÐSLUR SAMANLAGT:** | **14.964.518** | **15.056.594** | **15.618.570** |
| | | | | |
| | **INNTØKUR:** | | | |
| 0 | Hall at fíggja | 0 | 0 | 0 |
| -1.753.522 | Lántøka | 0 | 0 | 0 |
| 0 | Minking av likvidum (lánsgjøld) | 0 | 0 | 0 |
| -33.093 | Avdráttur av útlánum | -37.290 | 58.766 | -47.348 |
| -13.939.282 | Skattainntøka (netto) | -14.927.227 | -15.115.361 | -15.571.222 |
| **-15.725.897** | **F. FÍGGJAN SAMANLAGT** | **-14.964.517** | **-15.056.595** | **-15.618.570** |
| | | | | |
| 0 | Javnvág | 0 | -1 | 0 |
| **-2.892.843** | **ÚRSLIT áðrenn avdrátt:** | **-4.951.537** | **-4.072.314** | **-3.658.524** |

| Roknskap: 1995 | | Roknskap: 1996 | Meting 1997 | Fíggjarætlan: 1998 |
|---|---|---|---|---|
| | **Skuld:** | | | |
| 8.269.624 | Føroya banki | 7.843.767 | 7.396.900 | 6.543.108 |
| 9.486.102 | Tryggingarstovnar | 9.417.255 | 9.417.254 | 8.813.486 |
| 95.809 | Kommunukredit | 95.809 | 95.809 | 89.666 |
| 16.028.017 | Nykredit | 15.207.046 | 14.505.588 | 12.686.368 |
| 92.723 | Onnur lán | 19.104 | 0 | 0 |
| **33.972.275** | **Lán íalt** | **32.582.981** | **31.415.552** | **28.132.628** |
| 1.200.000 | Veðhald | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| 0 | Ognarar | 25.115 | 0 | 0 |
| 1.433.038 | Millumrokningar | 1.385.300 | 1.185.401 | 1.400.000 |
| **36.605.313** | **Skuld íalt** | **34.043.396** | **32.650.952** | **29.582.628** |
| 2.663.275 | Tøkur peningur | 4.695.756 | 6.681.111 | 6.736.362 |
| 1.269.329 | Kreppulánsgrunnur | 1.974.899 | 2.674.899 | 2.674.899 |
| 544.437 | Skuldarar | 1.675.740 | 1.661.094 | 1.520.000 |
| 327.273 | Millumrokningar | 413.108 | 354.500 | 335.000 |
| 1.595.104 | Útlán | 1.557.814 | 1.616.580 | 1.571.581 |
| **6.399.419** | **Ogn íalt** | **10.317.317** | **12.988.185** | **12.837.842** |
| **30.205.895** | **NETTOSKULD** | **23.726.079** | **19.662.767** | **16.744.787** |

